# Ein røð av musicals

London er avgjørt býurin, um tú vil uppliva ein musical – ella fleiri. Les Miserables er uttan iva heimsins best umtókti musical. Fleiri enn 50 milliónir fólk í 38 londum á 21 málum hava sæð hann. Hetta er eisini tann musical, sum hevur verið framførdur longst út í eitt, heilt frá tí hann hevði frumframførðslu í oktober 1985 fram til dagin í dag.

Hendingin fer fram í Fraklandi í 19. øld, og telur sangir sum »On My Own«, »One Day More« og »Do You Hear The People Sing«.

Les Miserables er innspældur 31 ferðir, millum annað ein platinseljandi útgáva frá uppsetingini í London, og ein Grammy-vinnandi Broadway-útgáva av musicalinum. Videoin frá 10-ára hátíðarhaldinum fyri gallakonsertini í Royal Albert Hall hevur selt fleiri enn eina million, og tað ger hana til eina av mest seljandi musicalvideounum í Bretlandi.

Uppsetingin hjá Cameron Mackintosh/Royal Shakespeare Company av Les Miserables eftir Alain Boubil og Claudes-Michel Schönberg er bygd á skaldsøguna hjá Victor Hugo, og hevur sangtekstir frá Herbert Kretzmer og tónleik av Claude-Michel Schönberg við orginalteksti av Alain Boubil. Les Miserables er tulkaður og leikstjórnaður av Trevor Nunn og John Caird.

Les Miserables varð fyrsti stóri vestligi musicalurin, sum er framførdur í Kina á enskum, tá hann varð framfødrur fyri fullum húsi í einum avmarkaðum tíðarskeiði í Shanghai Grand Theatre í juni 2002. Ætlanir eru um at seta leikin upp á kinesiskum.





























